UTTAN ÚR HEIMI

## Tingast um stjórn

Í Ísrael høvdu tey flestu væntað, at samráðingarnar millum Kadima og Arbeiðaraflokkin um at skipa nýggja stjórn fóru at ganga bæði skjótt og væl, men so varð ikki.

Í gjár noyddist Ehud Olmert, forsætisráðharri og formaður í Kadima, at viðganga, at samráðingarnar vóru truplari, enn hann hevði væntað, og at hann og formaðurin í Arbeiðaraflokkinum, Amir Peretz, vóru so mikið ósamdir, at teir høvdu gjørt av at útseta samráðingarnar nakrar dagar. Ísraelsk bløð skriva í dag, at teir báðir formenninir eru millum annað ósamdir um, hvussu ráðharrastørvini skulu býtast teirra millum.

– Vit skulu hava stundir til at hugsa okkum um, sigur Haggai Merom úr Arbeiðaraflokkinum við bløðini, men hann sigur seg vænta, at ósemjan verður loyst seinni í vikuni.

Kadima vann tjóðartingsvalið í síðsta mánað, men kann kortini ikki skipa stjórn einsamallur. Umframt Arbeiðaraflokkin er ætlanin at fáa Pensjonistaflokkin upp í samgonguna.

## Kongurin slakaði

Í nepalska høvuðsstaðnum Katmandu tustu fólk út á gøturnar í gjárkvøldið, eftir at Gyanendra kongur hevði kunngjørt, at hann hevði gjørt av at endurreisa tjóðartingið, sum hann sendi til hús fyri fýra árum síðani.

Í seinastuni hava túsundtals fólk hava mótmælt einaræði kongs, og andstøðan og fakfeløgini høvdu boðað frá stórum mótmælisgongum í dag. Tær eru nú avlýstar, men tann politiska støðan er kortini ikki greið enn. Ætlandi skuldu umboð fyri andstøðuflokkarnar hittast í dag at taka støðu til, hvussu teir skuldu svara teirri seinastu avgerðini hjá kongi.

Amerikanska uttanríkisráðið kunngjørdi í gjár, at tað hevði biðið nøkur av sínum umboðum í Nepal fara av landinum, men boðini vórðu tikin aftur aftan á røðuna hjá kongi í gjárkvøldið. Talsmaðurin hjá uttanríkisráðnum í Washington, Adam Ereli, rósti samstundis nepalska fólkinum fyri tess stríð fyri demokratii og frælsi.

## Abbas ávarar Hamas

Palestinski forsetin, Mahmoud Abbas, ger nú vart við, at sambært palestinsku grundlógini hevur hann heimild til at koyra ta nýggju Hamas-stjórnina frá. Hann leggur tó afturat, at sum er hevur hann ongar ætlanir um at nýta heimildina.

Mahmoud Abbas hevur ikki dult fyri, at hann vil hava Hamas-stjórnina at viðurkenna ísraelska ríkið, men ávaring hansara fekk umboð fyri Hamas at siga, at eina slíka viðurkenning kann forsetin ikki kroysta oman yvir stjórnina. Tvørturímóti hótti ein av Hamas-leiðarunum við at seta vápnahvíldaravtaluna við Ísrael úr gildi, um forsetin leggur ov stórt trýst á stjórnina.

– Eg vóni ikki, at forsetin koyrir okkum frá, tí ein slík avgerð hevði gjørt nógv størri skaða enn gagn, segði Hamas-leiðarin.

## Myrdi mammuna og beiggjan

Løgreglan í amerikanska statinum Maryland hevur skuldsett ein tólv ára gamlan drong fyri at hava stungið mammu sína og ein níggju ára gamlan beiggja sín so meint, at tey doyðu.

Grannarnir hava greitt frá, at tann tólv ára gamli drongurin er sera snarsintur, og at hann ofta gjørdist púra frá sær sjálvum, um tað ikki gekk honum eftir vild, tá hann spældi við sínar javnaldrar. Hví hann gjørdi av við mammuna og beiggjan, veit løgreglan ikki enn, men drongurin er nú sendur til eitt sinnissjúkrahús til kanningar, og har fer løgreglan eisini at avhoyra hann.

Tann tólv ára gamli er tann yngsti, sum nakrantíð er skuldsettur fyri morð í Maryland. Staturin hevur deyðarevsing fyri morð, men hon kann ikki brúkast, um drápsmaðurin er yngri enn fjúrtan ár, skrivar AP. Verður drongurin dømdur sekur, skal hann helst sita í fongsli, til hann verður 21.

# Al-Qaeda fær skyldina

**Egyptisku myndugleikarnir leggja al-Qaeda undir at hava lagt bumburnar, sum brustu í Dahab í gjárkvøldið**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



Tað var ikki av tilvild, at yvirgangsmenninir søktu at málum í Dahab, tí býurin er eitt av teimum væl umtóktu frítíðarplássunum í Egyptalandi. Málini vóru eisini væl vald, tí tær tríggjar bumburnar brustu beint við tvey av hotellunum í býnum og oyðiløgdu eina kaffistovu, eina matstovu og ein matvøruhandil.

Teir fyrstu tímarnar ljóðaði, at næstan 100 fólk høvdu latið lív, men seinni kunngjørdu egyptisku myndugleikarnir, at atsóknirnar høvdu kravt 23 mannalív, og at 62 onnur vóru særd. Millum tey særdu eru fimm danir. Teirra millum er ein smádrongur, og tíðindastovan AFP skrivaði í morgun, at hann hevði mist annan armin.

Nógvir ísraelsmenn plaga at halda frí í Sharm el-Sheikh og Dahab, og sambært ísraelska uttanríkisráðnum vóru fleiri hundrað ísraelsk ferðafólk í Dahab, tá bumburnar brustu. Beint eftir spreingingarnar beyð Ísrael sær til at senda læknar og bjargingarfólk um markið at hjálpa egyptum, og fleiri ísraelskir bussar komu til Dahab eftir ferðafólki.

**Al-Qaeda?**

Egyptiski forsetin, Hosni Mubarak, segði í gjárkvøldið, at tað vóru yvirgangsmenn, sum høvdu søkt at málum í Dahab, men hann nevndi ikki, hvørjir teir kundu vera. Fjølmiðlarnir vistu harafturímóti at siga frá ónevndum embætismonnum, at talan helst var um ein bólk hjá al-Qaeda.

Summir eygleiðarar ivast kortini í, at tað var al-Qaeda. Teir vísa á, at tað finnast sterkar kreftir í Egyptalandi, sum kenna seg kúgaðar av myndugleikunum, og sum hava hótt við yvirgangi. Tað er tí ikki óhugsandi, at tað var onkur tílíkur felagsskapur, sum legði bumburnar í Dahab, halda teir.

Í fjør vóru tríggjar bumbuatsóknir í Egyptalandi. Tann 7. apríl doyðu trý ferðafólk av einari bumbuspreinging í Kairo, tríggjar vikur seinni vórðu sjey fólk særd av einari aðrari bumbu í høvuðsstaðnum, og tann 23. juli drupu fýra bumbur 88 fólk í Sharm el-Sheikh.

# Handilin við sex-trælum skal steðgast

**Væl skipað brotsmannalið selja trælir úr meiri enn 100 londum, og tað stendur ikki á at finna keyparar**

TRÆLAHANDIL
*Árni Joensen*

ST-deildin, sum tekur sær av rúsevnahandli og øðrum lógloysi, UNODC, mælir nú øllum heimsins londum til at viðurkenna, at trælahandil er ein heimsumfatandi trupulleiki, og at tað tí áliggur altjóða samfelagnum at gera nakað við trupulleikan.

Sambært ST verða fleiri milliónir fólk seld sum trælir á hvørjum ári, og 77 prosent av teimum, sum verða seld, eru kvinnur. Næstan allar verða misnýttar kynsliga ella noyddar at arbeiða sum skøkjur.

– Tað er einki minni enn ein skomm fyri altjóða samfelagið, at vit framvegis hava trælahandil, sigur leiðarin í UNODC, Antonio Maria Cosat, við BBC. Hann ásannar, at ymiskt er gjørt fyri at steðga hesum handli, men at nógv restar í. Eitt nú eru myndugleikarnir í nógvum londum alt ov trekir við upplýsingum, sum kunnu tálma handlinum.

Sambært ST koma teir seldu trælirnir úr 127 londum, men teir flestu koma úr Afrika og Eysturevropa. Keypararnir eru nógvir, tí sambært ST eru keyparalondini ikki færri enn 137 í tali. Tølini hjá ST vísa, at teir flestu trælirnir enda í Evropa og Norðuramerika, men at fleiri enda í londum sum Ísrael, Kina og Japan.